umhvørvisstovan

ELFELAGIÐ SEV
LANDAVEGUR 92
POSTBOX 319
110 TÓRSHAVN

Argir hin 12. september 2022
Málsnr.: 21/01192-37
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Suni Petersen

**Góðkenning av árinsmeting fyri pumpuverk hjá SEV í Vestmanna**

## 1. Góðkenning og heimild

Umhvørvisstovan góðkennir, sambært §16, stk. 1 í løgtingslóg nr. 59 frá 2012 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni, við seinni broytingum, umhvørvisárinsmetingina hjá SEV um pumpuskipan hjá SEV í Vestmanna.

## 2. Umsókn

Umhvørvisstovan fekk hin 3. mars 2022 umhvørvisárinsmeting fyri eina ætlaða pumpuskipan millum vatnbyrgingarnar í Heygadali og uppi á Mýrunum í Vestmanna.

## 3. Lýsing av verkætlan

Talan er um eitt orkuverk við bæði vatnturbinum, sum skulu framleiða streym við vatni úr byrgingini á Mýrunum, og pumpum, sum skulu pumpa vatn úr byrgingini í Heygadali niðan í byrgingina á Mýrunum, tá avlopsorka frá vindmyllum er tøk. Hetta ger, at vatn í ávísan mun kann goymast í byrgingini á Mýrunum, og endurnýtast, tá tørvur er á tí. Eisini er skipanin við til at styrkja elnetið og gera elframleiðsluna støðugari, og harvið gera tað møguligt at økja um vindorkumáttin á netinum.

Verkið verður gjørt 400 metrar inni í fjallinum millum byrgingarnar í Heygadali og á Mýrunum, og verða tunlar gjørdir millum verkið og nevndu byrgingar.

Í sambandi við at spreingja høll inni í fjallinum til kraftstøð, atkomutunnil, sambindingartunlar, ventilatión, tekniskar bygningar, veg o.a. verða sprongdir uml. 190 tús. $m^3$ av gróti í føstum máti, sum geva uml. 390 tús. $m^3$ av leysum gróti.

Grótið verður eftir ætlan lagt á goymslu á trimum økjum í Heygadali (nevnd smáøki 1, 2 og 4) og einum øki uppi á Mýrum (smáøki 3). Áskotið á goymsluøkjunum verður grivið av og brúkt aftur sum áskot á grótgoymslunum.
Smáøkini 1-4 verða arbeiðspláss og fyribils ella varandi grótgoymslur. Tá ið verkætlanin er liðug, verður smáøki 4 endurskapað og grótið flutt til smáøki 2.
Hesi smáøkini síggjast á myndini niðanfyri.

Neyðugt verður í ávísan mun at styrkja vegirnar í økinum fyri at kunna tola tungu ferðsluna.



Lendistørvur til tunnlsmunna, byggipláss og grótgoymslur

## 4. Umhvørvisárinsmeting

Umhvørvisárinsmetingin viðger árin á náttúru og umhvørvi, sum kunnu standast av verkætlanini, bæði meðan tilgerðararbeiðið fer fram og frá rakstrinum av lidna verkinum.

Sjálvt turbinu- og pumpuverkið verður bygt inni í fjallinum, og verður tí ikki mett at fáa nakra serliga ávirkan á náttúru og umhvørvi. Verkið verður ómannað, og verður tí lítil ferðsla til og frá.

Í byggitíðini verður órógv frá spreinging, vegarbeiði og ferðslu. Av tí at verkið er langt frá bygdum øki, verður tað ikki mett at geva ampar í bygdum øki. Hin vegin verður órógv á fugl í byggitíðini.

Kanningar av økinum vísa, at fuglur reiðrast fram við vegnum og í teimum økjunum, har ætlanin er at leggja grót á goymslu. Talan er um tjaldur, spógva, mýrisnípu, steinstólpu, summartítling, og grátítling. Í teimum økjum, har ætlanin er at leggja grót á goymslu reiðrast tvey tjaldurspør, eitt spógvapar, tvey steinstólpupør og eitt summartítlingapar.

Í smáøki 1 í Heygadali eru vátlendi við vátlendisvøkstri. Eisini eru skrásett vátlendissløg av bæði plantum og klukkum í smáøki 1 og 2.

Í øllum økjunum, har ætlanin er at tyrva grót endaliga ella goyma tað til seinni nýtslu, eru áir annaðhvørt gjøgnum økini ella økini liggja dygst upp at áum.

## 5. Hoyring

Umhvørvisárinsmetingin varð hin 11. mars 2022 send til almenna hoyring. Freistin at koma við viðmerkingum var 11. apríl 2022. Niðanfyri er ein samandráttur av viðmerkingunum og svari hjá SEV til viðmerkingarnar. Umhvørvisstovan tekur svarini til eftirtektar.

5.1 Festarin av økinum viðmerkti, at grótið kundi verðið brúkt øðrvísi, eitt nú til at gera ein bakka fram við vatninum fyri at stuðla undir vegnum, tí at nógv tilfar er máað burtur við byrgingina og fram við vegnum í Heygadali.
Eisini heldur hann, at tað fer at órógva seyðahaldið, tí hann missir nógv beiti, serliga um veturin, um grótið verður tyrvt í økinum.

SEV hevur svarað, at SEV hevur samskift við Vestmanna kommunu um, hvussu grótið kann brúkast, og at SEV fer at kanna møguleikan til at brúka part av grótinum til tað, sum festarin vísir á.
Um mist beiti heldur SEV, at tað tað skal takast upp við Búnaðarstovuna.

5.2 **Borgari í Vestmanna** viðmerkir m.a., at Vestmenningar hava brúkt økið í Heygadali sum rekreativt øki, og at hesin møguleiki fer fyri skeyti av verkætlanini.
Eisini heldur hann, at verkætlanin fer at fáa størri ávirkan á fuglalívið, enn búlendislýsingin gevur fatan av.
Harumframt heldur hann, at samfelagsbúskaparlig árin mugu viðgerast í sambandi við verkætlanina.
SEV vísir til viðmerkingarnar omanfyri.
SEV viðmerkir eisini, at samfelagslig árin eru ikki viðgjørd, tí at tað ikki verður mett at vera partur av eini umhvørvisárinsmeting. Eisini verður nevnt, at bygningarnir verða projekteraðir og bygdir soleiðis, at bygningarnir hóska væl til nærumhvørvið.

5.3 **Føroya fuglafrøðifelag** heldur, at náttúrukanningarnar á økinum ikki benda á, at økini eru serstøk viðv. plantum, skordýrum ella fugli, men at grótrúgvurnar fara at hava eina týðandi og varandi ávirkan á lendið, sum fer at ávirka náttúruupplivingina, og at tað er lítið sannlíkt at grotrúgvurnar verða tiknar burturaftur.
Eisini vísir Føroya fuglafrøðifelag á møguleikan at brúka ein part av grótinum til at gera størri vatnbyrgingar, men at tað er treytað av, at náttúruvirðini í økinum verða kannað.

SEV hevur m.a. viðmerkt, at SEV hevur gjørt simuleringar av verkætlanini fyri at kanna, hvør útbygging er skynsamast við atliti at umhvørvi og búskapi.

5.4 **Borgari í Havn** hevur eina røð av viðmerkingum. Hann vísir m.a. á ein villu í sambandi við ætlaðu lægstu vatnstøðuna í Heygadali. Eisini verður víst á vandan fyri at fólk og dýr kunnu gerast føst í móruni, og tí koma í vanda.
Harumframt eru aðrar viðmerkingar, sum Umhvørvisstovan ikki metir eru viðkomandi fyri umhvørvisárinsmetingina.

SEV ásannar, at talan er um eina villu í sambandi við lægstu møguligu vatnstøðuna í Heygadali. Samstundis sigur SEV, at vatnstøðan av umhvørvis- og trygdarávum ongantíð verður koyrd niður á lægstu møguligu hæddina.
Eisini viðmerkir SEV, at vegna trygd verða girðingar settar upp við øll inntøkini í byrgingunum.

## 6. Viðgerð

Meðan arbeiðið fer fram, má roknast við, at serliga fuglur, sum reiðrast í økinum, verður ávirkaður av grevstri, ferðslu, óljóði o.ø. Men tann ávirkanin skuldi minkað munandi ella hildið heilt uppat, tá byggiarbeiðið er liðugt. Í teimum økjum, sum verða beinleiðis ávirkað av grevstri, spreinging o.ø., eitt nú har tunlar og ábøtur á vegir verða gjørdir og øki, har grót verður tyrvt, kann roknast við varandi ávirkan. Sannlíkt er, at eitt nú vátlendi og búøki hjá fuglinum í hesum økjum fara fyri skeyti, og at tann fuglur, sum reiðrast í hesum økinum má flyta burtur. Fuglurin kann møguliga flyta aftur til økið, tá mold er breitt á ella økini eru endurskapað. Men tað veldst um, í hvønn mun nýggja lendið hóskar til tey einstøku fuglasløgini.

Mett verður, at áirnar gjøgnum og upp at teimum økjunum, har grót verður fylt, verða ávirkaðar av grótinum og moldini, sum verður løgd oman á grótið. Sannlíkt er, at mold og møguliga grót við kann verða skolað burtur, tá áarføri er. Tí heldur Umhvørvisstovan, at øki til grótgoymslur ikki eiga at vera ov nær áum.

Samanlagt reiðrast seks pør av tjaldri, spógva, steinstólpu og summartítlingi í teimum økjum, sum ætlandi verða nýtt til grótgoymslur. Hesir fuglar verða tí ivaleyst noyddir at finna sær nýggj búøki, men Umhvørvisstovan metir, at talan er um eitt so mikið lítið tal, at tað neyvan fær munandi ávirkan á stovnarnar av hesum fuglum.

Uppskot til góðkenning varð send SEV til viðmerkingar hin 19. juli 2022. SEV hevði nakrar smávegis viðmerkingar, sum Umhvørvisstovan hevur tikið til eftirtektar.

## 7. Avgerð

Umhvørvisstovan góðkennir verkætlanina hjá SEV at gera pumpuverk í Vestmanna við hesum treytum:

7.1 Ætlanin verður framd, sum greitt er frá í tilfarinum, sum Umhvørvisstovan hevur fingið.

7.2 Fyri at órógva fuglin minst møguligt, skal miðast eftir ikki at fara undir grevstrararbeiði o.a. á hvørjum einstøkum øki í bútíðini hjá fugli í økinum.

7.3 Vega- og grevstrararbeiði o.l. skal gerast soleiðis, at natúrliga vatnrenslið í haganum verður ávirkað minst møguligt.

7.4 SEV skal í størst møguligan mun lata vera við at fylla grót nærhendis áum. Grótfylla skal í minsta lagi vera 10 metrar frá áarbakkum. Fyri at verja vátlendi í smáøkjum 1 og 2, skal grótfyllan vera í minsta lagi 20 metrar frá áarbakkanum. SEV sendir, áðrenn arbeiði byrjar, Umhvørvisstovuni eina ætlan um, hvussu farið verður fram fyri at verja áirnar.

7.5 Økini við grótgoymslum verða tyrvd við hóskandi nøgd av mold, og taðað við hóskandi nøgd av tøðum og, um tørvur er á tí, sádd við græsfræ, sum gevur lágvaksið gras, ið, sum frá líður, víkir fyri upprunavøkstrinum á staðnum. Miðast skal eftir at varðveita upprunadámin á lendinum.

7.6 Í seinasta lagi tríggjar mánaðir eftir, at arbeiðið á hvørjum einstøkum øki er liðugt, verður alt óviðkomandi tilfar, burturkast o.a. flutt av staðnum og burturbeint til hóskandi móttakara.

7.7 Eftir at verkætlanin er liðug, og grótgoymslurnar á smáøkjunum eru tyrvdar við mold, ella upprunalendið er endurskapað, og gróður er komin aftur, verða gjørdar nýggjar fuglateljingar í økjunum fyri at kanna, um fuglur er komin aftur á økið og um fuglalívið

er broytt. SEV sendur, í góðari tíð áðrenn kanningarnar verða gjørdar, Umhvørvisstovuni kanningarætlan til kunningar.

## 8. Eftirlit

Umhvørvisstovan hevur eftirlit við, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar.

## 9. Kæruvegleiðing

Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum. Møgulig kæra skal sendast til Umhvørvisstovuna, sum sendur kæruna til Umhvørvis- og vinnumálaráðið við neyðugum skjølum.

Kærur skulu vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi 10. oktober 2022.

Katrin Haraldsdóttir Jensen, deildarleiðari

Suni Petersen, málsviðgeri